VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL

Nr. 17 • týsdagur • 24. januar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# – Vóni at føroyingar vera kappingarførir

**Nú fyrsta oljuboring verður aftur á landgrunninum í mong ár verður aftur møguleiki hjá føroyskum fyritøkum at bjóða uppá arbeiði. Statoilstjórin vónar, at føroyingar bjóða seg fram og verða kappingarførir**

OLJUSÁTTMÁLAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

– Vit vilja gera okkara fyri, at føroyskir veitarar fáa so nógvar av sáttmálunum sum gjørligt. Hetta sigur Rúni Hansen, stjóri í Statoil, nú umleið eitt hálvt ár áðrenn farið verður at bora á landgrunninum. Hetta er so eisini í tráð við andan í føroysku løggávuni um, at í tann mun føroyskar fyritøkur eru kappingarførar, skulu tær fáa lut í virkseminum rundan um eina oljuboring.

Stena Don kemur í føroyskan sjógv miðjan juli og fer at bora í tveir til tríggjar mánaðir. Hetta er stutt tíð, tá hugsað verður um at fáa nakað týðandi virksemi burtur úr hjá føroyskum fyritøkum. Men hetta eru so umstøðurnar, nú tað bara verður ein brunnur boraður í ár. Tá oljufeløgini boraðu sínar fyrstu brunnar í 2001 vóru fleiri brunnar boraðir eftir hvønn annan, og tað gjørdi tað so nógv lættari og betri fyri føroysku tænastuvinnuna. Men hetta er so nýggi veruleikin, sum vinnan má taka við.

### Runavík

Statoil hevur gjørt av at brúka úgerðarhavnina í Runavík. Hon hevur annars ikki havt nakað arbeiði síðani borað varð fyri nøkrum árum síðani. Rúni Hansen vísir á, at aftrat utgerðarhavnini verður so eisini møguleiki hjá føroyskum fyritøkum at bjóða uppá tey stóru arbeiðini tvs. supply- og standbyskip og tyrlusáttmálar. Aftrat hesum koma so smærri sáttmálar, sum eigararnir av boripallinum taka sær av. Og her vísir tað seg oftani, at fyritøkur, sum borifelagið longu samstarvar við, fær tær kontraktirnar tvs. heldur fram við verandi sáttmálum.

Statoil vónar, at tær fyrstu kontraktirnar kunnu vera klárar at bjóða út í mars. – Eg vóni, at føroyingar fara at bjóða og vera kappingarførir sigur Statoilstjórin.

### Avmarkað tíð

Uppá fyrispurning um ikki fyritstøðufelag hevur skyldu til at sannføra eigarar av boripalli um, at hesir eisini skulu brúka føroyskar vørur og tænastur sigur Rúni Hansen, at tað sjálvandi er teirra uppgáva at gera feløgunum greitt, hvørjar lógir eru galdandi í Føroyum. Lógin leggur eisini upp til, at føroyingar fáa møguleika at vera við í virkseminum so nógv sum tilber. – Talan er tó bara um eitt virksemi í 2-3 mánaðir, men vit fara sum fyristøðufelag sjálvandi at siga við borifelagið, at har teir kunnu og har teir ikki hava tilfar oa. við, og har føroysk virki kunnu bjóða seg fram, har mugu teir eisini royna at geva føroysku feløgunum ein tjans at bjóða.

Her kann talan t.d. vera um viðlíkahaldsarbeiði og catering. Men tá báturin hevur ligið við eini langari kontrakt í Noregi og bara skal virka her í stutta tíð, so tað er ikki so beint fram. Men hetta er so nakað, sum komandi mánaðirnir fara at vísa.




*Rúni Hansen, stjóri hjá Statoil her staddur til oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Skjótt verða stóru kontraktirnar bodnar út*

*Mynd Jan Müller*






*Brúk verður fyri oljuskipum og tyrlum í sambandi við boringina í summar*



*Oljuútgerðarhavnin í Runavík verður brúkt í komandi oljuleiting*

*Mynd Jens K Vang*

# Dupultskattaavtala




*Báður Nielsen, landsstýrismaður á oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum*

**– Tá eg fór undir málið at fáa eina dupultskattaavtalu við Bretland helt eg, at tað fór at taka lítla tíð men tað havi eg lært, at tá tað kemur til avtalur millum lond, so tekur tað tíð at fáa tær uppá pláss sigurd Báður Nielsen, landssstýrismaður, sum tó er bjartskygdur, nú ein slík avtala er við at koma undir land**

OLJUSAMVINNA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Nógv eftirspurda dupultskattaavtalan við Bretland er nú so smátt við at koma undir land. Bárður Nielsen, landssstýrismaður í fíggjarmálum var við sum áhoyrari á stóru oljuráðstevnuni herfyri. Hann kundi tá koma við góðu tíðindunum til blaðið, at nógv umrødda dupultskattaaavtalan gerst veruleiki innan fyri eitt ár ella so.

Tað hevur í eina tíð verið tætt samskifti millum londini, ið bæði hava stóran áhuga í at fáa eina dupultskattaavtalu, soleiðis at lættari verður at samstarva og arbeiða hjá hvørjum øðrum. Tað er serstakliga oljuvinnan, sum royndir at skundir undir eina slíka avtalu, tí hon fer at gera tað rudduligari fyri allar partar.

## Uppskot

Uppskot eru send aftur og fram og skulu viðgerast av báðum pørtum. Enn eru nøkur ting, sum skulu fáast uppá pláss. Ein embætisbólkur er settur at gera tilfarið endaliga klár, og síðani verður ein fundur á politiskum stigi, áðrenn málið fer í tingini, parlamentini í báðum londum. Báður Nielsen vónar, at viðgerðin í tingunum kann vera í heyst ella seinni, soleiðis at ein endalig avtala kann skrivast undir tíðliga næsta ár ella í seinasta lagi móti sumri 2007.

– Bretar hava leingi ver-

# við Bretland á veg






*Tað er alstóran týdning fyri oljufeløgini, at ein dupultskattaavtala kemur uppá pláss millum Føroyar og Bretland. Tingini í Føroyum og í Bretlandi skulu góðtaka avtaluna seinast í hesum árinum, ella tíðliga í næsta ár*

*Mynd Jan Müller.*

ið sinnaðir at fáa eina dupultskattaavtalu við okkum. Men hetta tekur tíð at gera. Vit koma í eina kø hjá teimum, men teir hava verið ógvuliga skjótir at avgreiða tingini, tá vit hava spurt teir sigur landsstýrismaðurin, sum tó er samdur í, at hetta málið hevur tikið alt ov nógva tíð at loysa. Oljufelögini, sum arbeiða í Føroyum, hava í mong ár gjørt vart við ónøgd sína, at eingin slík avtala hevur verið. Vegna vantandi avtalu um skattligu viðurskiftini hjá eitt nú oljufólki, eru hesi skattað í báðum londum. Tað merkir m.a., at koma fólk frá útlendskum oljufelag á fund í Føroyum ein dag verða tey skatta fyri henda dagin í arbeiði.

### Tekur longri tíð

Bárður Nielsen tekur eisini í egnan barm í hesum máli. - Tá eg fór undir hetta málið at fáa eina dupultskattaavtalu við Bretland helt eg, at tað fór at taka lítla tíð men tað havi eg lært, at tá tað kemur til avtalur millum lond, so tekur tað tíð at fáa tær uppá pláss. Tað er tí, at hesi londini hava nógvar aðrar avtalur, sum verða umrøddar samtíðis, og tað er ikki óvanligt, at tað tekur nøkur ár at fáa eina dupultskattaavtalu uppá pláss. Men klára vit at fáa eina dupultskattaavtalu við Bretland uppá pláss í hesum árinum ella í 2007, so hevur tað gingið væl.

Ein slík avtala fer at gera, at bretar kunnu arbeiða inni hjá okkum uttan ampa, og vit kunnu arbeiða í Bretlandi uttan at koma at gjalda dupultskatt.

Bárður Nielsen vísir á, at hetta hevur eisini nógv at siga fyri føroyskar fyritøkur, sum vilja arbeiða á bretska marknaðinum. Tað er tó primert oljuvinnan hetta ynski fevnir um. Og ein grundin til at bretar so fegnir vilja gera dupultskattaavtalu við okkum er, at myndugleikarnir í Bretlandi hava fingið ábendingar frá bretsku oljuvinnuni um at fáa eina slíka avtalu við Føroyar.

# Mugu finna olju fyri




Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum heldur spurningin um oljuleiting og orkuveiting sum heild vera partar av somu søk

Mynd Álvur Haraldsen




Bjarni Djurholm, landsstýrismaður setti ráðstevnuna

Mynd Álvur Haraldsen

**– Alt bendir á, at oljuprísurin verður høgur framhaldandi og helst fer at hækka enn meira uppá longri sikt, um eftirspurningurin verður varandi. Føroyska samfelagið er so heft at oljuni, at vit tí hava tørv á antin at útbyggja viðvarandi orku munandi ella at finna oljuna sjálvir, so vit fáa eina javnvág í okkara oljunýtslu og framleiðslu sigur Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum**

OLJURÁÐSTEVNA

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

– Hetta var ein frálíkt ráðstevna. Um morgunin hevði eg kensluna av, at hetta kanska var ein hin mest áhugaverda, sum vit hava havt yvirhøvur. So avgjørdur er Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum, sum setti "Offshore Faroes 2006" í Norðurlandahúsinum nú um dagarnar. Magni Arge, sum hevur fylgt oljutilgongdini sera neyvt øll hesi seinastu árini bæði frá Vinnuhúsinum og frá palli sínum í Atlantsflogi veit betur enn nakar, hvussu álvarslig og tyngjandi framtíðin kann gerast fyri føroyska samfelagið halda oljuprísir fram við at hækka og vit ikki gera okkum minni heft at oljuni. Á oljuráðstevnuni kom fram, at Føroyar eru eitt tað land í øllum heiminum, sum er mest heft at eini orkukeldu, nevniliga oljuni. Ikki minni enn 94% av orkuforbrúkinum stava frá olju. Ímynda vit okkum, at prísirnir halda sær og bara vaksa eisini, so verður galin endi.

Og tað var nettupp tí, at formaðurin í Oljuvinnufelagnum, sum skipaði fyri ráðstevnuni var so fegin um, at tey ikki bara umrøddu leiting eftir olju men eisini prís, nýtslu og tørv á olju sum orkuveitari og á viðvarandi orkukeldum so sum vindorku og alduorku.

Magni Arge, sum hevur verið orðstýrari á teimum flestu av oljuráðstevnunum, sum hava verið í Føroyum seinastu árini er tískilt nøgdir við stevnuna, hóast onkur helt fyri, at leiting og orkuveiting og orkubrúk ikki áttu at verið blandað saman.

## Spennandi framløgur

– Tað var ein sera spennandi framløga bæði Heri Ziska og Gareth Allinson høvdu um leitingina á føroyskum øki og tætt við Føroyar. Tað var so eisini hugaligt, at bjartskygni eyðkendi framløgurnar. Eg haldi eisini, at framløgurnar hjá Magna Laksafoss og Richard Hardmann vóru sera tankavekjandi. Tær vóru ein sera góð introduktión at fara inn og hyggja eftir orkupolitiskum spurningum sum heild - at vit helst hava nátt "the peak" í oljuhøpi tvs. at vit kunnu ikki rokna við at finna líka nógva olju í framtíðini, sum vit koma at brúka. Harvið er ikki sagt, at vit koma í nakra stóra neyð her. Men tað sigur okkum í hvussu so er, at tað í Føroyum eins og man hevur gjørt sær greitt so nógva



Frá oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum, har bæði olja og viðvarandi orkukeldur vóru á skránni.

# at nøkta orkutørv



*Magni Laksafoss hevði sera áhugaverdan fyrilestur um oljutilgongdina úti og heima og vísti á, at 94% av føroyska orkubrúkinum stavar frá olju*

*Mynd Jan Müller*




*Eisini Richard Hardmann, jarðfrøðingur hevði áhugverdan fyrilestur um orku*

*Mynd Jan Müller*



aðrastaðni í so mong ár, má gera sær greitt, hvønn orkupolitikk man ætlar sær at reka í framtíðini.

Magni Arge heldur eisini, at var tað nakað, sum kom so greitt og týðliga fram frá fyrilestrarhaldarunum, so var tað sannroyndin, at vit eru so bundin at oljuni sum orkuveitari, ja so nógv meira bundin enn nógv flest onnur samfeløg eru. Tí var tað eisini sera hugaligt at síggja bæði SEV, Seawave og Røkt og eisini onnur initiativ, sum Súsanna Sørensen greiddi frá, og sum øll bera á tað borðið, at man hyggur eftir, hvussu vit kunnu minka um okkara binding at olju og fáa aðrar viðvarandi orkukeldur at virka í Føroyum.

Hann heldur, at tað var eisini áhugavert at hoyra um støðuna í Danmark viðvíkjandi vindmyllum og um støðuna í Íslandi. Hvat Ísland viðvíkur, so eru teir í eini heilt aðrari støðu, ja nærum eini heilt øðrvísi støðu enn vit. Teir hava ríkiligt av nærum ókeypis orku, meðan vit mugu keypa hana so gott sum alla.

## Krystallklár mynd

Myndin, sum varð málað á veggin á ráðstevnuni, var tí púra greið og krystallklár fyri Magna Arge: – Tú skal ikki rokna við, at oljuprísurin fer at lækka í framtíðini. Hann fer at vera relativt høgur og kanska bara at hækka uppá longri sikt, um annars eftirspurningurin fer at standa við. Tað verður ein byrða fyri føroyska samfelagið, sum er so heft at oljuni. So vit hava tørv á antin at útbyggja viðvarandi orku munandi ella at finna oljuna sjálvir, soleiðis at vit fáa eina javnvág í okkara oljunýtslu og framleiðslu. Groft sagt kann man siga, at annaðhvørt finnur tú oljuna og harvið fært tú stórar inntøkukeldur í Føroyum, ella finnur tú ikki oljuna, og so fært tú stórar útreiðslur og stórar trupulleikar at fáa vælferðina at hanga saman.

## Saknaði politikarar

Magni Arge metir tí, at hetta var ein øgiliga spennandi og tankavekjandi ráðstevna. Hann heldur tað kanska var spell, at tað ikki vóru fleiri politikarar og fólk frá umsitingini og fjølmiðlaverðini við á ráðstevnuni, tí hetta er av sera stórum almennum áhuga og týdningi, og kanska nógv meira enn bara spurningurin um at finna olju - nevniliga orkuspurningurin í síni heild.

– Vit hava øll orsøk til at ynskja Statoil bestu eydnuna við teirra leiting í summar og annars teimum, sum ætla sær at leita í føroyskum øki komandi árini.

Magni Arge viðgongur, at tað at fáa at vita, at okkara samfelag er so bundið at oljuni sum hagtølini vísa, ger, at tú verður sera illa við, hóast tú eigur at vita hetta. Tað setur so nakrar týdningarmiklar tankar í gongd, og tí í heldur Magni Arge ikki tað vera grundarlag fyri at seta spurnartekin við, um tað var rætt at taka spurningin um orkuveiting og alternativar orkumøguleikar við í eina "Offshore" ráðstevnu. Tvørturímóti var hetta ein skilagóð avgerð heldur hann.